Fylgiskjal 30

ROSAH

Tel: +298 227888 / rosah@rosah.fo /Heiðavegur 25 / FO-600 Saltangará / Føroyar

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

17. januar 2020

## Hoyringssvar til vælferðarlógina

Víst verður til uppskotini løgtingslóg um almannatrygd og vælferð og løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin, sum varð sent til hoyringar hin 23. desember 2019.

Eg vil vísa á at almennar uppgávur í størri mun eiga at verða lagdar til privatar veitarar. Tað eru serliga §§ 28 og 67 í vælferðarlógini, sum geva heimild fyri, at avtalur um tænastur nú eisini kunna verða gjørdar við privatar útleigarar og veitarar. Hetta gevur eina eyka trygd hjá brúkaranum fyri at fáa neyðugar veitingar, og hetta ger skipanina meira liðiliga. Eisini verður mett, at hetta kann skapa møguleika fyri búskaparliga skilabetri loysnum. Hetta taki eg undir við.

Eg haldi, at ráðgeving og veiting av hjálparráðum frá privatum veitarum eisini eiga at verða tikin við í hesa lóg, t.d. í § 67.

Eg haldi at ein bagatelgreinsa eigur at vera sett á hjálpartól/hjálparráð. Tað vil siga, at vørur sum hava virði undir evt. 500 kr eigur brúkarin at ogna sær sjálvur. T.d. verður søkt um pissifløsku og haldara. Pissifløskan kostar sum nú er 30 kr og haldarin 99 kr. T.d. í § 29 stk. 8 (3)

Annars vil eg gera eina viðmerkjing um, at eg meti tað hevði veri best, um vit í Føroyum høvdu eina hjálpartólamiðstøð/goymslu. Eg veit tað kemur inn á markamót.
Hjálpartólamiðstøðin útvegar hjálpartól til varandi tørv.
Sjúkrahúsið eigur at útvega hjálpartól til fyribils tørv.
Ofta hevur sjúkrahúsið ikki hjálpartólini. Brúkarin verður sendur til Hjálpartólamiðstøðina, og verður vendur í hurðini, tí har verður bert veitt hjálpartól til varandi tørv. Haldi ofta tað er ein keðilig støða fyri brúkarin.

Vinaliga
**Mariann Poulsen Garðalíð**
**Ergoterapeutur**

ROSAH

Tel: +298 227888 / rosah@rosah.fo /Heiðavegur 25 / FO-600 Saltangará / Føroyar